## DAGSINS MEINING

# Ræðumynd veruleiki

Hin versta ræðumyndin hjá USA og Bretlandi í Miðeystri er eitt borgarakríggj í Irak. Tá lopið varð á Irak fyri trimum árum síðan, varð hildið, at alt fólkið í Irak sameint fór at fagna hersetingarvaldinum. Tað ráddi bert um at fella Saddamstýrið, so fór alt at laga seg av sær sjálvum. Men soleiðis kom tað ikki at ganga. Irak er ein statur víst so, men har eru stórir bólkar og stór spjaðing, ið sjálvsagt elvir til maktstríð, so skjótt ein einaræðisharri sum Saddam Hussein er burtur. Tað er henda myndin, sum USA og Bretland ikki dugdu at síggja, tá lopið varð á í óðum verkum fyri trimum árum síðani.

Í Irak eru tríggir stórir meginsamfelagsbólkar, sum í øldir hava staðið hvør móti øðrum. Hesir valdsbólkar eru kurdar, sunni muslimar og shia muslimar. Herumframt eru aðrir smærri men týðandi samfelagsbólkar t.d. tey kristnu. Ymsar kolveltingar- og byltingarstjórnir hava eftir annan heimsbardaga lagt nógva orku í at beina burtur mótsetningarnar millum hesar bólkar eitt nú við at skipa politiskar flokkar. Í ártíggjur var Baath flokkurin hjá Saddam Hussein tann formliga ráðandi politiski flokkurin. Roynt varð at sameina allar samfelagsbólkar í henda eindarflokk, men til fánýtis. Ein meginorsøkin var, at Saddam var ráður einaræðisharri og sunni muslimur. Hann forfylgdi kurdum og shia muslimum og gjørdist tí hataður av hesum bólkum.

Tað undrar nógv fólk fyri vestan, at irakiska fólkið ikki kann semjast, nú USA og Bretland hevur fríað hetta fólk fyri einaræðisharran. Hetta er torført at skilja, um ein hugsar sum ein vestulendskur demokratur. Sær ein hinvegin støðuna við eygunum hjá fólki og politikkarum í Miðeystri, er tað ikki so torført at skilja. Samgongan, sum leyp á Irak, hevði bert ein plan A – hon hevði ongan plan B. USA, Bretland og hini sameindu høvdu onga greiða hóming av, hvussu politiska tómrúmið eftir Saddam skuldi fyllast. Amerikanska stjórnin hugsaði sær ein leist sum tann japanska eftir annan heimsbardaga. Tað gekk ikki m.a. tí, at gjógvin millum kurdar, sunni- og shiamuslimar er ov stór. Nú hevur innanríksiráðharrin í Bagdad so formliga boðað frá, at borgarkríggj er í Irak – ræðumyndin er vorðin veruleiki. Henda støðan kann enda við, at fundamentalistiskir shia muslimar taka ræðið í Irak. Úrslitið verður, at vit fáa eitt Iran afturat í Miðeystri. Hendir hetta, má ein spyrja, hvat ið var vunnið við álopinum á Irak fyri trimum árum síðani.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tað sum kemur úr kassanum, má fyrst í kassan

HELGI ABRAHAMSENA



**Politikarar kunnu ikki loyva sær at billa fólki inn, at upphæddin, sum fer niður í landskassan, onga ávirkan hevur á, hvussu nógv kann takast úr kassanum aftur, skrivar Helgi Abrahamsen**

So upplivdu vit tað aftur! Løgtingið viðgjørdi týsdagin eitt uppskot um barnafrádrátt til einsamallar uppihaldarar, og tá viðgerðin hevði vart eina løtu, var orðaskiftið bent inn á spurningin um, hvat landskassin hevur ráð til, sum støðan er.

Og so hendi tað aftur...

Ein av tinglimum Tjóðveldisfloksins fór upp á røðarapallin við eini av sínum afturvendandi søgum um, at tá ríkisstuðulin var uppá tað hægsta, vóru umstøðurnar hjá tí veikasta bólkinum í samfelagnum ringast.

Boðskapurin var ikki til at misskilja. Tinglimurin vildi hava fólk at trúgva, at vit hava betri ráð til vælferðartænastur nú, enn vit høvdu áðrenn blokkstuðulin minkaði. Ella sagt við øðrum orðum: Blokkstuðulin tryggjar onga vælferð í Føroyum.

**Tvey avgerandi viðurskifti**

Tað sum hesin tinglimurin segði, kann í besta føri kallast villleiðing. Tað eru nevniliga tvey grundleggjandi viðurskifti sum eru avgerandi fyri, hvussu høgar ella lágar pensjónir og aðrar almennar veitingar kunnu vera. Fyri tað fyrsta er hetta ein spurningur um raðfestingar. (Hvussu velja politikarar at býta almennu pengarnar út, sum teir eru settir at umsita)? Og fyri tað næsta, er tað eisini ein spurningur um, hvussu nógvar pengar teir hava at býta.

Tað at nógvir pengar eru í kassanum er í sær sjálvum ikki nøkur trygd fyri, at øll fáa nóg mikið. Men harvið er ikki sagt, at tað kann vera líkamikið um kassin er fullur ella tómur.

**Skeivar raðfestingar**

At raðfestingarnar mangan kundu verið øðrvísi enn tær hava verið, kunnu øll vera samd um. Men eg skilji ikki, at fullveldislandsstýrið kundi fáa seg til, við fríðum vilja, at biðja um at fáa eina minni upphædd at býta, fyri síðani at billa fólki inn, at hetta kom onga ávirkan at fáa á, hvussu nógv bleiv í part. Nei tvørturímóti siga tey nú, at niðurskurðurin er beinleiðis orsøkin til, at fólk fáa meira frá tí almenna, enn tey annars høvdu fingið.

"*Hygg bara eftir 80-unum*, verður sagt sum ræðudømi um, hvussu galið tað kann ganga, tá nógvir pengar eru í samfelagnum. Og so gloyma tey at siga, at trupulleikin í 80-unum var ikki, at inntøkurnar vóru ov høgar, men heldur at raðfestingarnar á útreiðslusíðuni vóru skeivar.

**Sera einfalt**

At rokna við pengum er ikki so innviklað sum summi royna at gera tað til. Leggur tú eina krónu í ein pengakassa, og tvær krónur í ein annan pengakassa, so kanst tú taka eina krónu úr kassanum, sum tú legði eina krónu í, og tvær krónur úr hinum kassanum. Talið av krónum, sum tú kanst taka úr kassanum er altíð avmarkað til upphæddina, sum tú fyrst legði niður í kassan.

Tingfólk Tjóðveldisfloksins kunnu ikki loyva sær at billa fólki inn, at talið av krónum, sum fer niður í landskassan, onga ávirkan hevur á, hvussu nógv vit kunnu taka úr kassanum aftur.

# Góða Gunnvør!

Takk fyri bræv títt í Dimmalætting í gjár viðvíkjandi lítla Petur.

Sum flestu munnu vita, hava vit frá byrjanini av, tá hetta ólukkuliga málið byrjaði, víst tí stóran ans. Vit hava eftir førimuni roynt at virka við til eina góða loysn fyri fyrst av øllum Petur, men eisini hansara nærmastu.

Mong eru tey brøv, vit hava skrivað, hava lutikið í mongum fundum og orðaskiftum, og nógvir eru teir fyrispurningar, vit hava sett fram á Løgtingi- bæði munnligir og áfráboðaðir.

Tað er rætt, sum tygun nevna í brævinum, at vit lovaðu tygun, og tí fylgibólki, ið virkar fyri Petur, at seta fram skrivligan fyrispurning um málið. Hetta tilboð okkara stendur óbroytt við, tí vit meta framvegis, at nógvir spurningar eru, ið krevja svar. Men sum tygun vita, bíða vit enn eftir tilfari, sum okkum varð lovað í sambandi við ger av fyrispurninginum.

Vinarligast

***v. Miðflokkin***
**Bill Justinussen**
**Jenis av Rana**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.